# Miðvís venjing gav úrslit

**Í farnu viku skrivaði 16 ára gamli Johan Troest Davidsen úr Runavík undir trý-ára sáttmála við enska Premier League felagið, Everton FC, og sambært Johan sjálvum er sáttmálin eitt úrslit av miðvísari venjing seinastu mongu árini**

FÓTBÓLTSLÆRLINGUR Í ONGLANDI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Tað er ein dreymur, sum er vorðin veruleiki hjá tí 16 ára gamla runavíkinginum Johan Troest Davidsen, nú hann hevur gjørt ein trý-ára sáttmála við kenda enska felagið Everton.*

Hósdagin í farnu viku var skipað fyri samkomu í Runavík, tá ið 16 ára gamli NSÍ-leikarin, Johan Troest Davidsen, skrivaði undir ein trý-ára sáttmála við enska Everton. Fyrsta góða árið skal Johan verða lærlingur, men frá 18 ára føðingardegnum verður runavíkingurin yrkisleikari. Spurdur um Everton er dreymafelagið í Onglandi svarar Johan eitt sindur foyur, at tað er tað ikki. – Eg havi altíð verið Manchester-viðhaldsmaður, men nú verður tað kanska broytt, sigur hann við einum skeivum brosi.

### Nógv kropslig venjing

Johan greiðir frá, at hann seinastu mongu árini hevur vant miðvíst fram ímóti at gerast yrkisleikari. – Eg havi vant miðvíst leingi, og serliga tey seinastu trý til fýra árini havi eg vant sera nógv. Í veruleikanum havi eg vant alt tað, ið eg havi verið førur fyri, sigur hann. Umframt vanligu venjingarnar við liðfeløgunum hevur Johan eisini gjørt rættuliga nógv við kropsliga venjing, og sjálvur er hann ikki í iva um, at tað hevur givið úrslit. Venjari hjá Johan tey flestu ungdómsárini í NSÍ hevur verið hin navnframi Abraham Løkin, og hann fær eisini eina heilsu við á vegnum frá Johan. – Tað er eingin ivi um, at Abraham eigur ein stóran part av æruni fyri, at hesin dreymurin hjá mær nú er veruleiki, tí hann hevur verið ein ótrúliga góður venjari at havt øll árini, sigur komandi Everton-leikarin.

### Byrjaði sum málverji

Tá ið Johan um sjey ára gamal fór at venja fótbólt í NSÍ, byrjaði hann sum málmaður. Seinni kom hann úr málinum, og síðani tá hevur hann at kalla altíð leikt í verjuni. – Eg havi næstan altíð spælt í verjuni, tí at eg havi verið rættuliga stórur í mun til mínar javnaldrar, greiðir Johan frá.

Hóast hann einans er 16 ára gamal, hevur Johan longu fingið eitt sindur av spælitíð á 1. deildarliðnum hjá runavíkingum. Í steypafinaluni á ólavsøku móti HB, bleiv Johan innskiftur í seinna hálvleiki, og mánadagin í farnu viku leikti hann allan dystin, tá ið NSÍ vann 2-1 á Skála. Í seinasta dystinum fyribils fyri NSÍ leygardagin móti HB, gekk tað minni gott hjá Johan, tí hann bleiv rikin av vølli stutt inn í seinna hálvleik.

### Droymir um landsliðið og Premier League

Tað eru einar tríggjar vikur síðani, at Johan var og royndarvandi í Everton, og síðani tá hevur tað gingið øgiliga skjótt, greiðir hann frá. Saman við Johan í Everton var eisini Christian Mouritsen úr HB, men enn er tað tó bert Johan, ið hevur fingið bjóðað sáttmála.

Spurdur um hann ikki er bangin fyri at kenna seg eitt sindur einsamallan í Liverpool, har Everton er heimahoyrandi, sigur Johan. – Tað verður kanska eitt sindur einsligt, men eg fann væl út av tí við einum íslendingi, tá ið eg var har, so tað er altíð ein uggi, sigur hann.

Ungi runavíkingurin sigur, at stóri dreymurin er at sleppa at spæla í Premier League, men ein minst líka stórur dreymur er at spæla á føroyska a-landsliðnum. – Eg rokni við, at sleppi eg at spæla í Premier League, so komi eg eisini á landsliðið, sigur runavíkingum, sum hevur verið á øllum ungdómslandsliðum, ið hann hevur havt aldur til.

Johan Troest Davidsen sigur eisini, at eftir hansara tykki hava fleiri av liðfeløgunum á føroyska U17-landsliðnum góðan møguleika fyri at gera honum kynstri eftir og fáa útlendskan sáttmála. Hann roknar somuleiðis við, at Everton ikki enn hevur gloymt Christian Mouritsen, tí tá ið teir báðir vandu í enska felagnum, leiktu teir ein venjingardyst við U16-liðnum hjá Everton. Teir vunnu 4-2, og Christian skeyt eitt av málunum!

Í gjár fór Johan Troest Davidsen saman við umboðsmanni sínum Jákupi í Stórustovu til Onglands, og longu í komandi viku fær ungi runavíkingurin vitjan av familjuni, sum er boðin til Onglands av Everton.

# Stórur áhugi fyri føroyskum leikarum

**Tað er Jákup í Stórustovu frá North Atlantic Football Agency, ið vegna Johan Troest Davidsen og NSÍ hevur tikið sær av samráðingunum við Everton. Jákup sigur, at áhugin fyri ungu føroysku leikarunum er vaksandi**

YRKISFÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Um tað er nakar her á landi, ið hevur fingurin á pulsinum viðvíkjandi útlendskum áhuga fyri føroyskum fótbóltsleikarum, so er tað Jákup í Stórustovu frá North Atlantic Football Agency. Jákup hevur nú í fleiri ár virkað fyri at fáa serliga ungar føroyskar leikarar út um landoddarnar at royna seg.

### Feløgini arbeiða meiri seriøst nú

Jákup sigur, at tað er einki at ivast í, at føroysku fótbóltsfeløgini arbeiða nógv meiri seriøst nú, enn tey hava gjørt. – Venjararnir eru nógv betur útbúnir nú enn áður, og tað er einki at ivast í, at tað er eitt úrslit av miðvísa menningararbeiðinum hjá FSF. Arbeiðið hjá fótbóltssambandinum er heilt avgjørt við til at hækka støðið, sigur Jákup á Stórustovu.

– Tað er einki at ivast í, at vit hava heilt nógv talentir í Føroyum, og eg merki væl, at tað er ein vaksandi áhugi fyri teimum ungu føroysku leikarunum. Nú fer Johan so til Everton, og Ingi hevur verið í Arsenal, og hetta eigur at verða ein gularót fyri føroysku feløgini at síggja, at tað ber til, heldur Jákup í Stórustovu.

Seinni í hesum mánaðinum skal føroyska U17-landsliðið royna seg í kapping í Føroyum, og tá koma umboð fyri fleiri útlendsk feløg hagar at hyggja at ungu monnunum. Fleiri av teimum, ið tá koma til Føroya, vóru eisini í Finlandi, tá ið føroyska U17-landsliðið herfyri luttók í kapping har.

Føroyska U19-landsliðið skal um nakrar vikur royna seg í kapping í Skotlandi, og Jákup í Stórustovu sigur, at tá verða at kalla øll tey ensku feløgini til staðar fyri at hyggja at leikarunum. Spurdur um vit kunnu vænta, at nakar annar ungur føroyskur leikari í næstum skrivar sáttmála við útlendskt felag, sigur Jákup í Stórustovu, at tað er væl hugsandi, at onkur fer at skriva sáttmála, áðrenn flytingarvindeyga letur aftur 31 januar komandi ár.



# Hann er øgiliga búgvin

**Mamma Johan Troest Davidsen, Jenni, er ómetaliga errin um elsta sonin, sum nú hevur fingið yrkissáttmála í Onglandi**

BÚGVIN DRONGUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Johan saman við allari familjuni: sitandi frá vinstru: lítlasysturin 5 ára gamla Kristina, mamman Jenni, Johan og pápin Fróði. Ovast frá vinstru: Abbin Kaj Aage, omman Johanna, lítlibeiggin Arnhold 13 ár og omman Henny*

Tað er við ikki sørt av blandaðum kenslum, at familjan hjá Johan Troest Davidsen veittrar honum farvæl, nú hann stingur í klæðssekkin og heldur leiðina til Onglands, har hann skal búleikast næstu trý árini.

### Hann er í góðum hondum

Jenni sigur, at Johan hevur vant ótrúliga hart í nógv ár, og hann hevur verið serstakliga miðvísur í sínari venjing. – Eg haldi, at hann hevur verið sera seriøsur í allari sínari venjing. Eg eri ikki bangin um hann, tí hann er øgiliga búgvin, og harafturat eri eg sannførd um, at hann er í góðum hondum, sigur Jenni Troest Davidsen.

Familjan hjá Johan er sera væl nøgd við tað arbeiði, sum umboðsmaðurin hjá Johan, Jákup í Stórustovu, hevur gjørt fyri drongin og fyri familjuna, og tey gleðast um, at dreymurin hjá Johan nú er vorðin veruleiki.

Í komandi viku er øll familjan hjá Johan, t.v.s. mamman Jenni, pápin Fróði, og tey bæði yngru sysktini boðin til Onglands av Everton at síggja umstøðurnar, sum Johan skal búleikast undir næstu árini.

Jenni greiðir frá, at Johan skal búgva í einum húsi saman við fimm øðrum ungdómsleikarum hjá Everton, og at vaksið fólk er knýtt at húsinum, sum kann hjálpa ungu drongjunum við ymiskum.

# Avbjóðarin í essinum

**Peter Leko gjørdi bart í fimta talvinum og javnaði samstundis út í HM-dystinum móti Vladimir Kramnik**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Mong vóru tey, sum væntaðu at Kramnik ikki fór at tapa í HM-dystinum móti Peter Leko. Heimsmeistarin vann tað fyrsta talvið í dystinum og telvaði eisini sera trygt næstu trý talvini, ið endaðu við javnleiki. Tey flestu vóru kanska bangin fyri, at øll talvini hareftir fóru at enda við javnleiki.

Men í fimta talvinum, har Peter Leko hevði hvíta fólkið, varð meistarin koppaður. Leko valdi at leika varligt byrjanarspæl, 1.d4 staðin fyri 1.e4, sum hann vanliga telvar. Teir fylgdu einum talvi hjá Karpov og Anand heilt út til endatalvið. Hetta talvið endaði javnt. Kramnik leikti ikki eins neyvt sum Anand og kom at standa trýstur.

Sunnudagin varð sætta talvið leikt. Kramnik, sum nú hevði hvíta fólkið, fekk einki burturúr og tók gleðiliga ímóti remistilboðnum hjá Leko eftir 20 leikum. Støðan er tí 3-3. Leko tykist væl fyri og spennandi verður at vita hvussu leikur fer fram týsdagin, tá sjeynda talvi verður telvað. 14 talv skulu telvast.

### OL fyrireikingar

Talvolympiadan nærkast. Seks mans gleða seg at sleppa at royna talvevnini á Mallorka í døgunum 14-31. oktobur. Talvsambandið hevur sett ein landsliðsvenjara, 23 ára gamla IM Sergey Kayumov (2404) úr Usbekistan.

Tað eru Martin Poulsen og Hans Kristian Simonsen, ið á einum av teirra mongu talvferðum hava hitt Sergey. Hesin ynskti at hjálpa vinmonnunum og føroyska landsliðnum á Mallorka og avtala varð síðani gjørd millum hann og Talvsambandið. Sviin IM Emil Hermansson, sum herfyri luttók í 3rd Klaksvík International, bjóðaði seg eisini fram sum venjari. Eftir góðu viðmælini Martin og Hans Kristian góvu Sergey, fall valið á usbekistanaran.

Í hesum døgum er landsliðsvenjarin heima í Føroyum og leggur lag á. Venjingarnar ganga gott.

Manningin á føroyska OL-liðnum er hendan: 1. Martin Poulsen 2. Hans Kristians Simonsen 3. Olaf Berg 4. John Rødgaard 5. Eyðun Nolsøe 6. Carl Eli Nolsøe Samuelsen. Ferðaleiðari og liðleiðari verður danin, altjóða talvdómarin og føroyavinurin Mogens Nielsen.

## Talvið hesa vikuna

Peter Leko (2741) - Vladimir Kramnik (2770) WC SUI (5), 02.10.2004

1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Rif3 d5 4.Ric3 Be7 5.Bf4 0-0 6.e3 c5 7.dxc5 Bxc5 8.cxd5 Rixd5 9.Rixd5 exd5 10.a3 (Hvítur leggur sítt spæl eftir at trýsta á d-finnuna) 10...Ric6 11.Bd3 Bb6 12.0-0 Bg4 13.h3 Bh5 14.b4 Re8 15.Rc1 a6 16.Bxa6 Rxa6 17.b5 Rxa3 18.bxc6 bxc6 19.Rxc6 (Teir fylgja framvegis einum talvi millum Karpov og Anand) 19...Ra7 (Møguliga kann Re6 leikast ístaðin) 20.Rd6 Rd7 21.Fxd5 Rxd6 22.Fxd6 Fxd6 23.Bxd6 Bxf3 (Anand valdi ikki at býta bispin av í talvinum móti Karpov, sum endaði javnt. Møguliga er avgerðin hjá Kramnik ein feilur. Hvítur fær eina dupultfinnu, men svartur sleppur sær hinvegin av við bispaparið í endatalvinum) 24.gxf3 Bd8 25.Rb1 Bf6 26.Kg2 g6 27.f4 Kg7 28.Rb7 Re6 29.Rd7 Re8 30.Ra7 Re6 31.Bc5 Rc6 32.Ra5 Bc3 33.Rb5 Ra6 34.Rb3 Bf6 35.Rb8 h5 36.Rb5 Bc3 37.Rb3 Bf6 38.e4 Ra5 39.Be3 Ra4 40.e5 (Finnurnar mugu við í leikin, um vinnast skal) 40...Be7 41.Rb7 Kf8 42.Rb8+ Kg7 43.Kf3 Rc4 44.Ke2 Ra4 45.Kd3 Bh4 46.Bd4 Ra3+ 47.Kc2 Ra2+ 48.Kd3 Ra3+ 49.Kc4 Ra4+ 50.Kd5 Ra5+ 51.Kc6 Ra4 52.Kc5 Be7+ 53.Kd5 Ra5+ 54.Ke4 (Nú stendur hvítur nærum optimalt. e5+ er ein hóttan) 54...Ra4 55.Rc8 Bh4 56.e6+ Bf6 Støðumynd

Støðumynd eftir 56...Bf6

57.e7! (Vinnandi) Rxd4+ 58.Ke3 Bxe7 59.Kxd4 (Støðan er nú vunnin, men tað krevur tó presist spæl) 59...Bh4 60.f3 f5 61.Rc7+ Kf6 62.Kd5 Bg3 63.Rc6+ Kg7 64.Ke5 h4 65.Rc7+ Kh6 66.Rc4 Kg7 67.Ke6 Bh2 68.Rc7+ Kh6 69.Kf7 (Eftir Bxf4 vinnur Rc6 og síðani Rxg6 lættliga) 1-0